Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eyðgunn Samuelsen, løgtingsmaður

Svarari: Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

Evni: Sernám og menning hjá børnum

Spurningar:

1. Er tað framvegis Sernám, ið foreldur og starvsfólk á barnaøkinum skulu venda sær til, tá tey eru stúrin um menningina hjá barninum?
2. Er tað framvegis uppgávan hjá Sernámi at greina støðuna hjá børnum, um illgruni er um autismu, ADHD o.s.fr. og um neyðugt at ávísa barnið til psykiatriina til útgreining?

Viðmerkingar:
Seinastu tíðina eru bíðilistarnir hjá psykiatriini øktir sera nógv - frá 183 børnum í 2019 til 306 í 2020. Sambært leiðandi yvirlæknanum á Psykiatriska Deplinum er tvífaldingin av bíðilistanum tekin um, at børnini verða gjørd sjúkari enn tey eru, og at nógv av teimum áttu at verið tikin hond um aðrastaðni í skipanini. Langi bíðilistin kann tí vera við til, at tey børn, ið hava brúk fyri skjótari hjálp, koma at bíða alt ov leingi.[1] Eisini hava vit hoyrt stúrin foreldur í miðlunum, bæði viðvíkjandi bíðitíðini og iva um, hvagar tey skulu venda sær, tá tey eru stúrin um menningina hjá teirra børnum.

Mannagongdin í dag er tann, at er barnið heima, kunnu foreldur venda sær til kommunulækna ella heilsufrøðing um stúranina, og hesi kunnu vísa víðari til Sernám, um barnið hevur tørv á tí.

Er barnið á dagstovni, kunnu foreldrini venda sær til starvsfólkini um stúranina. Starvsfólkini skulu síðan vísa til Sernám, um tey hava somu stúran um barnið.

Tað er uppgávan hjá Sernámi at greina støðuna hjá barninum grundað á eygleiðingarnar hjá foreldrum, heilsufrøðingi og starvsfólkum í dagstovnunum. Tá støðan er greinað, vendir Sernám aftur við ráðgeving til starvsfólk á dagstovnunum sambært innanhýsis mannagongd á Sernámi. Sernám skal standa fyri greiningini og taka avgerð, um barnið skal vísast til Psykiatriska Depilin til útgreining. Hetta fyri at fyribyrgja, at børn óneyðugt verða ávíst til psykiatriina, sum kann økja um bíðitíðina.

---

1 http://kvf.fo/netvarp/sv/2021/05/25/20210525bornverdagjordsjukariennteyeru?fbclid=IwAR2OfGqewZXmjDxCVyChoxCdBBlsNIroEKZ9X_Qv-sNlMmvIUsR4Y9tOTpY

Fyri at fáa staðfest um omanfyrinevnda mannagongd er broytt, verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 28. september 2021

Eyðgunn Samuelsen